# Harmaljóð um landsvegir í bygdum øki

**Malan Johannesen**
*Fyri tey í nummar 43*

**Gisleyg Bonde**
*fyri tey í nummar 47*

Jólini eru í hondum, og tað ljóðaði sum fagrasti jólasongur í okkara oyrum, at formaðurin í Ráðnum fyri ferðslutrygd, Rúna Sivertsen mælir frá, at landsvegir ganga gjøgnum bygt øki. Tí tað halda vit eisini, sum búgva við Villingadalsvegin, har talan er um at leggja landsveg beint oman fyri húsini hjá okkum. Vit kenna við teimum í Sandavági, í Miðvági og ikki minst við teimum á Skipanesi og aðrasteðs í landinum, har tung ferðsla fer grøvandi gjøgnum túnini uttan fyrilit fyri fólki og fæ. Tíbetur heldur stjórin fyri Landsverk, Oyvindur Brimnes, sum varðar av vegunum millum bygdir, at tað er óheppið, at vegirnir í sínari tíð eru lagdir, sum teir eru. Tað er tíbetur ásannað so manga steðs til dømis sluppu Kvíkingar undan ferðsluni, tá landsvegurin varð lagdur langt oman fyri bygdina, soleiðis eigur tað at vera, og soleiðis má tað verða framyvir. Halda ivaleyst tey flestu..

Men so er ikki. Ein nýggjur landsvegur skal leggjast í Havn. Tey rópa hann ringveg, og hann verður í skrivandi stund bygdur omanfyri randarhúsini millum Gilja og skal ganga her omanfyri húsini hjá okkum og bindast í niðri við Maskinskúlan. Her búgva nógv fólk og her balist eisini mangt annað livandi.

**Gomul ætlan**
Tað er onki nýtt, at her skal vegur verða. Ætlaninar vórðu lagdar fyri fleiri enn 20 árum síðan, og ætlanin er ikki endurskoðað síðan, hóast fólk her búgva hava mælt til, at so verður. Seinast tá uppskot varð lagt fyri Løgtingið um at endurskoðað ætlanina til tess at meta um, hvørt ikki frægari varð, at vegurin varð lagdur burturfrá húsunum, so umhvørvið undir hamrinum kundi varðveitast. Í viðmerkingunum til lógina varð mælt til, at leggja vegin omanfyri hamaran ella at leggja hann í tunnil. Landsverk hevur gjørt eina meting, sum er send avvarðandi myndugleika, sum tó ikki hevur tikið støðu til metingina. Kortini verður vegurin bygdur, sum um onki varð og er komin hartil, at sett er á vestan fyri Villingadalsvegin. Hetta varð kortini steðgað av Tórshavnar kommunu. Men maskinurnar standa í fyrsta giri tveir metrar frá, til reiðar at seta á.

**Havnin í vøkstri**
Vit hava hoyrt at Tórshavnar býráð hevur ætlanir um at keypa lendi til at byggja á millum annað í Hoyvíkshaganum, men vegurin gongur longu gjøgnum allan Hoyvíkshagan, og áðrenn vit hava vent okkum gongur vegurin væl og virðiliga gjøgnum bygt øki har, og her hjá okkum er longu bygt. Tískil er ongin ivi um, at neyðugt verður við einum ytra ringvegi afturat um heilt fá ár. Fyri ikki um at tala, tá landfast verður við Sandoynna og longur suður. Nýggi vegurin verður tá ikki til ta stóru nyttuna, og hvat er tað so vert?

**Hvar skal landsvegurin leggjast eftir ætlanini?**
Hann skal ganga framvið hamrinum oman til Maskinskúlan, har hann skal bindast í Norðara ringveg og hvat er tað fyri øki? Vit sum búgva her, og øll tey mongu, sum spáka her hvønn tann einasta dag vita, hvussu her sær út. Vestan fyri húsini eru gamlar træðir, har seyður og flogfenaður heldur til. Serliga kend er trøðin hjá Andriasi Reinert, sum er heimstaður hjá teimum sjáldsomu bramgæsnum, umframt hópin av føroyskum gásum og øðrum gásasløgum. Eisini hevur hann dunnur og høsn gangandi. Á øllum hinum trøðunum gongur seyður og annað fæ. Vestan fyri trøðirnar gongur hamarin, sum virkar sum ein verjugarður fyri hendan partin av Havnini, hann er brattur, og á nógvum trøðum eru veldugir klettar, sum eru rullaðir oman í fyrndini. Her er bæði vill náttúra og friðsælur grønur bøur. Økið er rætt og slætt ein perla fyri havnarborgarar, og eisini fyri tey mongu sum vitja høvuðsstaðin, sum knappliga kenna seg sum vóru tey á bygd. Her koma skúlaflokkar og barnagarðsflokkar og ikki um at tala tey sum renna, spáka ella stavgongufólkini. Og so øll tey sum ambæta sínum kríatúrum, her er eitt umhvørvi, sum ótrúliga nógv fólk hava gleði av. Ongin okkara fatar, at nakar kann finna uppá at leggja ein landsveg her. Hetta er eitt av teimum fáu grønu og eitt sindur villu plássunum, sum eru eftir í Havn, skal tað leggjast undir landsveg? Vit fáa okkum ikki at trúgva tí! Og tað sum er einamest ótrúligt er, at vit duga illa at ímynda okkum, at hesin vegastubbin verður til nakra serliga nyttu fyri tey, sum skulu til Havnar, tí Villingadalsvegurin og Sundsvegurin eru beint við. Tað eru illa nokk 100 metrar ímillum og øll ferðslan skal oman á Norðara ringveg og Marknagilsvegin og hvar fer hon so? Tey sum koyra bil hvønn dag vita, hvussu rokilsi er eftir tí vegnum og annars í býnum, sum Oddvør Johansen vísir á í lesarabrævi. Er hetta nøkur loysn? Hon er ring at fáa eyga á.

**Perlan undir hamrinum**
Hinvegin er lætt at fáa eygað á, at høvuðsstaðurin hevur brúk fyri andarholum, tað eru nøkur fá, eitt nú trøðin uppi við Hoydalsá, sum er eitt vælsignilsi og ikki minst tær góðu gøturnar, sum Tórshavnar býráð hevur latið gjørt við glottarnar, sum so nógv hava gleði av. Tí ivast vit onga løtu í, at rætta loysnin er at gera trøðirnar her uppi til andarhol, at friða tær ella partar av teimum, gerið gongugøtur, kanska eisini pláss til reiðgøtur, heruppi, so vit og ikki minst øll onnur sum búgva í býnum, og tey sum vitja høvuðsstaðin kunnu gleðast um, at Havnin hevur pláss fyri fólki, sum brúka beinini og sum gleðast um tað, sum livandi er. Her er gott at vera sum er, men eitt satt paradís hevði tað verið, um tað bar til at spáka undir hamrinum og sæð niður yvir trøðirnar og lívið sum har yður av.

Vit halda, at tað er gott at gera vegir, so lagaligt er at sleppa aftur og fram, men vit eru so inniliga samd við tey, sum gremja seg um, at landsvegirnir ganga gjøgnum bygd øki og eisini við Landsverk, sum heldur tað er óheppið, tí rokna vit við, at henda ætlanin er ein misskiljing og ráða øllum sum varða av, at umhugsa hesa vegagerð av nýggjum.

Við ynski um trivnað, gott umhvørvi og gleðilig jól

---

# Harraborgir í huganum?

**Rolf Guttesen**
rg@geogr.ku.dk



**Løgmaður hóttir við at spreingja norðurlanda samarbeiði. So sigur tíðindaskriv frá løgmansskrivstovuni útsent 29.11.05. Hvat er meiningin?**

Svenski sendimaðurin í Danmark, Lars Grundberg, hevur verið á vitjan í Føroyum, og sjálvandi eisini hitt løgmann, Jóannes Eidesgaard.

Tað ljóðar av tíðindaskrivinum, sum vóru fremstu ørindi løgmans at tosa um, kunna um ella agitera fyri at Føroyar fingu serligan status í Norðurlandaráðnum. Sum suverenur statur, líka sum Svøríki ella Finnland, hóast Føroyar - sum kunnugt - eru partur av ríkisfelagsskapinum, við øllum teimum fyrimunum, sum tað gevur.

Men eftir sum Helsingforsavtalan frá 1962, sum er samarbeiðsgrundarlagið hjá Norðurlandaráðnum/Nordisk Råd, byggir á samarbeiði millum lond ella statir, tvs. veruligar suverenar statir, Svøríki, Norge, Danmark, Finnland og Ísland, so ber ikki til at ganga føroyska ynskinum á møti.

**Hvør var politiska dagsskráin hjá fullveldislandsstýrinum?**
Hon var fyrst og fremst at skapa illstøðu millum Danmark og Føroyar. Tá samráðingar um loysing endaðu við, at Høgni og Anfinn fóru sjaggandi frá Christiansborg ongul í reyv, var næsti leikur at skapa split, sáa illtanka og blása konfrontatiónir upp.

Høgni førdi ann. Forlanga tað ómøguliga, og segdi, at danska stjórnin vil ikki lova okkum framat nakrastaðni. "*Vit, staklarnir, blíva bara kúgaðir, tað er so ræðuliga synd í okkum.*" Teir bóðu bæði Nato og ST og íslendskar super-specialistar um at leggja uppí.

Eitt tiltak var, at Anfinn Kallsberg sum løgmaður í 2003 forlangaði, at Føroyar skuldu metast sum suverent land í norðurlandaviðurskiftum, hóast allur politikkurin hjá fullveldislandsstýrinum hevði spælt fallit. Teir tordu ikki at leggja loysingarspurningin út til fólkaatkvøðu, lúshundarnir. So kom hetta bíliga útspælið. Boðini vóru sjálvandi, bæði frá danskari síðu, og frá Norðurlandaráðnum, at hetta bar ikki til. Men baktankin er sjálvandi, at kunnu teir fáa hini norðurlondini, ella bara Ísland, at siga okkurt pent um Føroyaland, so kann tað brúkast sum argument í øðrum sambondum.

**Dangan darlar víðari**
Nú svenskarin var í Føroyum, var argumentið ført fram av javnaðarløgmanninum, eins og var hann umboð fyri sama fallitt-fullveldislandsstýri. Men nú er ein nýggj konstruktión uppfunnin fyri at Føroyar kunnu <u>látast</u> at vera suverenur statur. Nú skal alt grundarlagið undir norrøna samarbeiðinum, sum er Helsingforsavtalan, broytast.

*"Løgmaður gjørdi sendiharranum greitt, at Føroyar eiga at kunna gerast limur treytað av, at Helsingforssáttmálin verður samsvarandi broyttur til eisini at fevna um sjálvstøðug mentanarøkir."*

Úrslitið fer at vera ein degradering av samarbeiðinum millum londini, til at verða eitt kultursamarbeiði millum økir ella regiónir. Alt í lagi, so koma finnlandssvenskarar, samar í Norra, Svøríki og Finnlandi, týskarar í Suðurjyllandi, og kanska eisini skånebúgvar og bornholmarar uppí. Spurningurin er hvat í allari víðu verð tað skal brúkast til?

Norðurlandasamarbeiðið hevur ikki tann allarstørsta tydning longur, um tað nakrantíð hevur haft tað. Verjupolitikkur liggur fyri ein stóran part í Nato, og búskapur liggur mest í ES.

**Føroyar hava fína umboðan!**
Norðurlandaráðið er sett saman av umboðum, sum parlamentini/tingini velja, og londini hava hesi tøl:

| | |
|---|---|
| Svøríki | 20 |
| Norge | 20 |
| Finland | 20 |
| Danmark | 20 |
| Ísland | 7 |

Í hesum fimm delegatiónum hava Grønland og Føroyar so 2 umboð hvørt í donsku delegatiónini, og Álandsoyggjarnar 2 umboð í finsku delegatiónini. (kelda: www.norden.org) Reelt hevur "gamle" Danmark bert 16 umboð.

Í mun til fólkatalið hava Føroyar eina stóra yvirumboðan, umleið 1 umboð uppá 25.000 íbúgvar og Grønland nakað tað sama. Gamla Danmark hevur 1 umboð fyri 325.000 íbúgvar. So um nakað er galið, so kundi tað verið kvaliteturin av føroysku umboðnum? Ella, hvat skal ráðið yvirhøvur brúkast til?

**Nordisk Ministerråd?**
Í norrøna samarbeiðinum er eisini ráðharraráðið, ella ministararáðið, har stjórnirnar í londunum hittast og skifta orð. Eru Føroyar so útilokaðar úr hesum høga forum? Á-nei, her eru í forsamlingini av fíggjarráðharrum til dømis, í alt 9 nøvn. Ein úr hvørjum landi og ein úr hvørjum sjálvstýrandi øki. Also Bárður Nielsen er síðu um síðu við Thor Pedersen og Pär Nuder úr Svøríki. Og í Transportráðnum situr Bjarni Djurholm og undir liðini á honum - ella kanska yvirav - Flemming Hansen transportministara, sum umboðar Danmark.

**Ætlar at kloyva Norðurlond?**
Tíðindaskrivið sigur frá, at løgmaður "*legði dent á, at vísa tey eysturnorrønu londini ikki størri áhuga fyri føroyska ynskinum, kunnu norðurlond "brotna av um miðjuna" - í eystur- og vesturnorðurlond*"

Hvussu svenski sendimaðurin hevur tikið hesa opinlýsu hóttan, stendur einki um. Bert at hann ætlaði at bíða eftir niðurstøðuni hjá samstarvsráðharrunum. Men hann hevur helst skoðað út yvir Glyvursnes og Borðuna og hugsað sítt.

Almenningurin veit ikki, um løgmaður hevur eina dagsskrá væl goymda í innara lumma, at sáa split, at fáa norðurlond at brotna av um miðjuna, um man ikki sleppur at veipa við nationalistisku frustratiónunum. Men førir hetta krav til at kvetting eisini her, so er enn einaferð alt mist. Ynskið um størri luttøku, kann føra til onga luttøku. Hatta var ein tápulig hóttan.

Undir øllum umstøðum er tað sera sjáldsamt, kanska ójoyrt, at ein samráðingapartur - her Løgmaður - ikki bara hóttir í teim munnligu samráðingunum. Men eisini at hann letur tað fara í referatið, sum so verður sent almenninginum. Tað ljóðar, sum hann tosar vegna Grønland og Ísland eisini. Hvør er dagsskráin?? Hvat ætla teir??

**Hvat skal tað vera gott fyri?**
Hví ikki spyrja, hvat fæst burturúr hesum samarbeiði, sum er? Er yvirhøvur meira at heinta hagani? Er tað ikki løgting og landsstýri, sum uttan innblanding velja sínu umboð í Ráðið og Ministararáðið? Hvønn rætt ella fyrimun hava hinir, sum Føroyar ikki hava? Førir javnaðarflokkurin, stuðlaður av sambandsflokkinum, bara fullveldisgorri víðari?